Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Arnadóttir
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord

Stefan í Skorini
Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 **Fax.** 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Samgonga og andstøða nærkaðust

Oddagrein

SAMGONGAN og ein partur í andstøðuni nærkaðust nakað í orðaskiftinum um ólavsøkurøðuna hjá løgmanni, tá tað leið nakað út fríggjadagin og leygardagin. Hetta var partvíst eftir, at formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, hevði havt orðið og partvíst eftir, at fólkafloksmaðurin, Bjarni Djurholm, nærmast heitti á samgonguna um at venda fullveldismálinum á høvdið.

HANN nevndi møguleikan at sleppa ætlanini um at skipa Føroyar sum fullveldi nú, men í staðin gera ein sáttmála, sum miðjar ímóti at gera Føroyar sjálvbjargnar búskaparliga, samstundis sum Føroyar so við og við yvirtaka tey málsøki fyrisitingarlig viðurskifti, sum danir umsita í dag. Hann vísti á, at endamálið er tað sama – at skipa Føroyar sum sjálvstøðugt ríki. Men spurningurin er bara, nær hetta skal fara fram. Nú ella um eini 10, 12 ella 15 ár. Formaður Fólkafloksins, Óli Breckmann, nevndi nakað tað sama fyrr í orðaskiftinum hósdagin.

HESAR áskoðanir minna rættiliga nógv um uppskot Javnaðarfloksins um eina sjálvstýrislóg fyri Føroyar, og áskoðanina hjá Javnaðarflokkinum um, at Føroyar skulu hava evsta vald í øllum yvirtiknum málum. Formaðurin vísti á, at ganga vit hesa leið – at gera Føroyar sjálvberandi búskaparliga og fyrisitingarliga, samstundis sum málsøki verða tikin yvir – so er bara spurningurin eftir henda dag: skulu vit nú skipa Føroyar sum fullveldi ella ikki.

ORÐASKIFTIÐ kom ikki til nakra niðurstøðu – sum heldur ikki er vanligt – men nakrar ábendingar eru um, at samgonga og andstøða kanska skilja hvønn annan eitt lítið sindur betri, hóast gomlu og vanligu skuldsetingarnar ofta ljóðaðu frá røðarapallinum. Ikki minst frá teimum meiri »frelstu« tjóðveldisfólkunum, sum skuldseta øll tey, sum ikki eru loysingarfólk fyri sambandsfólk. Hetta er líka so ókonstruktivt íkast til hetta orðaskifti, sum leysakast Sambandsfloksins um at øll, sum ikki tvíhalda um óbroyttan ríkisfelagsskap, eru loysingarfólk.

FØROYSKA fólkið stendur tvíbýtt í hesum máli. Øsingin frá kreppuni og bankamálinum hevur lagt seg, og tað verður neyðugt at finna eina pragmatiska loysn, sum kann fáa undirtøku frá meiri enn tveimum av teimum størru flokkunum og sum kann fáa undirtøku frá einum stórum meiriluta í Føroya fólki. Ólavsøkurøðan og orðaskiftið um hana benda á, at landsstýrið veit ikki rættiliga, hvat næsti leikur skal vera, nú stjórnin heldur fast um stutta skiftistíð og meirilutin í landsstýrinum ásannar, at við hesum grundarlagi ber ikki til at leggja nakað uppskot fyri føroyska veljaran. Tí er neyðugt, at samgonga og í øllum førum partar í andstøðuni fara í nýggjar tingingar um eina føroyska støðu í sjálvstýrismálinum.

Sosialurin

Grindaboð í Hattarvík

Fyri fyrstu ferð nakrantíð er ein hvalur dripin í Fugloy. Seinnapartin í gjár svam ein døglingur seg fastan millum nakrar steinar í fjøruni og so vóru menn skjótir at skera hann á háls

SVEINUR TRÓNDARSON

Hattarvík: Tað vóru grindaboð í Hattarvík sunnudagin. Um hálvgun fimm tíðina varnaðust menn, at tveir døglingar lógu og spældu sær uttan fyri bygdina. Teir lógu tætt við land og tá teir gjørdu av at fara nærri, rendu teir seg fastar. Annar á einum skeri, hin millum nakrar steinar í fjøruni. Og tað var tann seinni, sum legði beinini í Fugloy.

Fugloy er ikki grindapláss, men nú er hvør lakatunna full av døglingatvøsti

Fyrstu ferð hvalur er dripin

Hetta er fyrsta ferðin, at hvalur er dripin í Fugloy. Umstøðurnar at drepa grind í Fugloy eru ikki til staðar, so tað skal í veruleikanum vera talan um ein vilstan hval, sum hendan, um hvalur skal drepast har.

Men tað kemur líka væl við fyri tað, sigur Eivind Jacobsen.

- Teir lógu beint uttanfyri bygdina og spældu sær. Vit eygleiddu teir úr bygdini og tað var ikki fyrr enn teir komu heilt inn móti landi, at vit fóru at gera okkum til, sigur Eivind.

Hann greiðir frá, at tá hvalirnir komu inn ímóti, vendu teir hvør sín veg, men teir fóru báðir upp á turt.

- Tann hvalin, sum kom inn í fjøruna, fingu vit hendur á, men hin fingu vit einki gjørt við. Hann rendi seg upp á eitt sker, men slapp sjálvur av aftur eftir eini løtu, sigur Eivind, sum leggur afturat, at hvalurin bløddi illa, tá hann helt til havs aftur.

Býtt til bygdafólkið

Døglingurin, sum legði beinini í Hattarvík var ikki so lítil heldur, frætta vit úr Fugloy. Eivind Jacobsen greiðir frá, at teir máldu døglingin at vera góðar sjey metrar langan, men hvat tað svarar til í grindamáti, torir hann ikki at siga.

Døglingur er ikki vanligur gestur um Fugloyarleiðina, og tí gjørdu hattarvíkingar ikki mætari enn at ringja til Hvalbiar og til Náttúrugripasavnið eftir góðum ráðum.

- Haðani fingu vit at vita, at spikið ikki er etandi, og tí var tað alt burturbeint. Tvøstið er harafturímóti góður matur, og tað var ríkiligt til av tí eisini. Tí var tað býtt til alla bygdina, sigur Eivind Jacobsen.

Vanliga er ikki so nógv fólk í Hattarvík, men nú summarið er, hevur heilt fitt av fólki verið og tey fingu øll part í hvalinum. Sum skilst vóru partarnir stórir.

Eru altíð til dystin fús

Hóast hetta var fyrsta ferðin, at "grind" er dripin í Fugloy, so eru fugloyingar ikki eiðasøðir tá tað kemur til grindarakstur.

- Eru líkindi so fara vit, sigur Eivind.

Hjá fugloyingum er lættast at fara í grind í Sundum, og sum skilst, verður farið hvørja ferð tað er so mikið kyrt - og tá so mikið av fólki er - at tað ber til at flota bát.

- So vit eru ikki óroyndir í so máta, sigur Eivind.

Kortini er tað meira sjáldan, at grindapartarnir eru so stórir, sum teir vóru hesaferð, tí mangan er smábýtt tí grindin skal býtast til eitt so stórt øki.

- Tað er sjáldan meiri enn eitt kók í part. Hinvegin fáa teir, sum eru við í drápinum eisini nakað, men tað er sjáldan tað øgiliga stóra. Nú eydnaðist so at fáa ein hval fyri seg sjálvan og hóast einki spik var hesaferð, so leggja hattarvíkingar ikki so nógv í tað. - Næstu ferð vit fara í grind, fara vit eftir spikinum, sigur Eivind og flennir.

Sum skilst á Eivindi, verður tvøstið fryst. Úr Hvalba hava tey fingið at vita, at døglingatvøst ikki er so vælegnað at saltað, og tí hava tey gjørt av at frysta alt samalt. Tað hevði nú heldur ikki verið so heppið fór tað fyri skeytið.

Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, við á ymsan hátt sýndu samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og systir

MAJA HANSEN
Søborg
(ættað av Slættanesi)

brádliga andaðist. Takk til sangarar og berarar, til Skipafelagið Føroyar og ein serlig tøkk til John Myllhamar og David Johannesen fyri troystarrík orð í kirkjuni, takk til tykkum øll, við fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Familjunnar vegna

Kaj, Christian og Lene og ommubørn

BBC sendir um grind

Onnur av heimsins størstu tíðinda-sjónvarpsrásum, BBC-World, fer eftir ætlan í morgin at senda eitt innslag um føroyskt grindadráp í tíðindasending síni. Tað fer at verða sent einar fimmseks ferðir.

Tað er tíðindamaðurin James Proctor, sum var í Føroyum vikuna undan ólavssøkuni, sum hevur gjørt innslagið.

Hann hevur eisini gjørt eitt innslag um fullveldisætlanina. Hetta fer væntandi at verða sent í BBC-World síðst í næstu viku, sigur landsstýri í einum kunningarskrivi

Stórhvalakanning fór í fisk

Um miðjan juni vóru sendarar festir á átta nebbafiskar, men bert ein teirra sendi heim eitt stutt tíðarskeið

DIA MIDJORD

Sendararnir vórðu skotnir í nebbafiskarnar úr tyrlu. Tyrlan fleyg lágt uppi yvir og dúkkaði, tá ið stórhvalurin kom undan. Hetta gekk fyri seg fýra dagar í tíðarskeiðnum frá 11. til 26. juni.

– Tað eydnaðist væl at fáa sendararnar festar, men teir vóru ov veikir og megnaðu ikki at senda. Bert ein hvalur sendi heim eitt stutt tíðarskeið, sigur Dorete Bloch.

Hon leggur aftrat, at okkurt eisini hevur verið í ólagi við fylgissveininum, tí hesin hvalurin sendi bert fýra ferðir. 21. og 24. juni, og 3. og 6. juli.

Royna av nýggjum

Djórasavnið hevur fingið fýra aðrar sendarar, ið eisini skulu festast á nebbafiskar. Tað kemur ein serfrøðingur á vitjan í næstum, sum skal festa hesar sendarar.

– Teir hava verið royndir í Íslandi við stak góðum úrslitum. Talan er um smáar sendarar, ið gjørdir eru at virka einar fimm vikur, sigur Dorete Bloch.

Sendararnir skulu skjótast í nebbafiskarnar úr Tjaldrinum. Húðroyndir verða tiknir samstundis. Tað er Namco, ið hevur bílagt hesa kanningina úr Føroyum. Líknandi kanning verður gjørd í Noregi, Íslandi og Grønlandi.

Jónhild givin at senda

Nú er triði grindahvalurin eisini givin at senda, og bert Mads Petur ringir regluliga heim til telduna hjá Dorete Bloch

DIA MIDJORD

Um tað er bardagi á grynnuni, ella hvalirnir hava funnið eitt hvørt snildi fyri at sleppa av við sendaran á hornínum, er torført at meta um. Men vit kunnu staðfesta, at bert ein hvalur sendir regluliga heim.

Tað er Mads Petur, ið trúliga ringir heim, meðan Jónhild nú eisini hevur valt at kvetta sambandi við fylgissveinin.

– Vit vóna nú, at hesir hvalirnir koma í eitt grindadráp. Tá kunnu vit so kanna sendara, og hvussu nógv hornið er slitið, sigur Dorete Bloch.



Bert ein av teimum fýra hvalunum, ið høvdu sendara, sendir regluliga heim til telduna hjá Doretu Bloch

Hon sigur víðari, at tey higartil hava fingið hópin av nýggjari vitan, men at tað kortini er eitt sindur hugstoytt, at bert ein hvalur sendir heim, tí sendararnir eru gjørdir til at virka eitt heilt ár.

– Næstu ferð fara vit at broyta útsjóndina á sendarunum, so mótstøðan í sjónum verður minni. Vit skulu minnast til, at hetta er ikki roynt áður, so vit mugu royna okkum fram, sigur Dorete Bloch.

Kalvaalingin gongur sum ætlað

Stjórin á Fiskaaling, Símun Joensen, sigur, at teir vónandi kunnu strúka teir 100 kalvarnar tíðliga komandi vár

DIA MIDJORD

Gongur sum ætlað, verður kalvaaling aftur ein partur av virkseminum hjá Fiskaaling. Í løtuni svimja á leið seksti kalvar í kørunum á støðini við Áir, og ætlanin er at fáa fatur á fleiri kalvum, so tað tilsamans verða einir 100 kalvar.

Símun Joensen, stjóri á Fiskaaling, sigur, at arbeiðið higartil gongur sum ætlað. Kalvarnir svumu í byrgingini við Streymin, men seinast í farna ári fingu teir tak yvir høvdið.

– Ætlanin er so, at kalvarnir einaferð tíðliga komandi vár skulu strúkast, og síðan verður farið undir at framleiða yngul, sigur Símun Joensen og leggur aftrat, at tað er serliga torført at ala kalvayngul.

Í løtuni verða kalvarnir bert fóðraðir, so teir kunnu búnast aftur til gýting komandi vár. Talan er ikki um smáar kalvar, tí teir størstu viga eini hálvtannaðhundrað pund.

Pakkaferðir summarið 2000
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
Danmark
DanCenter summarhús
1 vika í summarhúsi
Danland íbúðir
1 vika í frítíðaríbúð
kr 12.697,-
kr 11.882,-
Noreg
Pers Hotel í Gol
1 vika í summarhúsi
kr 8.905,-
Hetland
Easter-houll Chalets
1 vika í summarhúsi
kr 7.962,-
Bílferia í Europa
Weissenhäuser Strand í Norður-Týsklandi
1 vika á frítíðardepli
kr 13.335,-
Ísland
Pakkaferð
Key Hotellini
við 7 daga innivist á hotelli í dupultkamari
kr 4.033,- fyri hvonn
Sigla & Flúgv
Siglt verður annan vegin og flogið hinvegin
Tórshavn - Hanstholm
og Keypmannahavn - Vágar ella hinvegin
kr 2.445,- fyri hvonn
• • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • • fyri 2 vaksin & 2 børn í bili • • •
e-mail: booking@smyril-line.fo